Vinnulívið í Leirvík:

# Stúrir fyri órógvi og skerdum møguleikum fyri útbygging

**– Útbyggingar hava verið upp á tal av og á, men tær útbyggingar, sum Tavan kann gera, eru suðureftir og omanfyri verandi bygning. Niðanfyri eru ikki stórir møguleikar, sigur felagið í skrivi til myndugleikarnar**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í sambandi við borgarafundin, sum verður í Leirvík fríggjakvøldið um vegaføringina í sambandi við Norðoyatunnilin, hevur lítið verið at frætt um, hvat vinnulívið í Leirvík heldur um hetta mál.

Tað er tó eingin loyna, at leiðslan í Tavuni, sum er gulllaksa-og upsavirkið í Leirvík, yvirfyri myndugleikunum hevur gjørt vart við síni sjónarmið.

Í brævi, sum felagið hevur sent landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm við avriti til Leirvíkar bygdarráð, vísir Tavan á fleiri viðurskifti, sum tala ímóti fjøruloysnini.



*Vinnulívið í Leirvík er ikki so fegið um fjøruloysnina, og tí kann hugsast, at ávísar rembingar verða á borgarafundinum í Leirvík fríggjakvøldið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Órógv undir bygging

Við tunnilsloysnini omanfyri Tavuna, væntar felagið ikki, at hendan kemur at órógva arbeiðið, tá ið hon er framd, men meðan verkætlanin verður framd, stúrir felagið fyri, at nógv órógv verður.

– Vit vænta, at ferðslan til og frá Tavuni verður tarnað, eins og hetta kemur at ganga útyvir parkeringsplássið hjá arbeiðsfólkunum. Haraftrat kunnu vit vænta avbrot í sambandi við umlegging av vatnveiting, el-kaðlum og øðrum.

Felagið væntar, at ein vegaføring – uttan tunnil – omanfyri Tavuna hinvegin kemur at órógva rættiliga nógv.

Her væntar felagið, at ein stórur partur av økinum sunnanfyri Tavuna verður brúkt til veg, sum kemur at skerja arbeiðsøkið munandi.

– Tær útbyggingar, sum Tavan kann gera, eru suðureftir og omanfyri verandi bygning. Niðanfyri eru hinvegin ikki stórir møguleikar fyri útbygging.

### Útbyggingarætlanir

Felagið vísir á, at útbyggingar hava verið upp á tal av og á.

– Um bygt verður omanfyri verandi bygning, kemur hetta at ganga útyvir parkeringsøkið.

Í skrivinum til landsstýrismannin við avriti til Leirvíkar kommunu heitir Tavan staðiliga á partarnar um at taka málið upp til nýggja viðgerð og saman finna bestu loysnina.

# Gøta stuðlar Leirvík

**– Landsins myndugleikar eiga altíð at sýna ynskjunum hjá lokalu myndugleikunum ans, heldur Gøtu kommuna**

VEGAFØRING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá Leirvíkar kommunu liggur ein greinastubbi, sum sigur, at Gøtu kommuna gevur Leirvíkar kommunu sín fulla stuðul í krøvunum um at fáa eina fyri Leirvíkar bygd nøktandi loysn á vegaføringini í sambandi við Norðoyatunnilin.

– Landsins myndugleikar eiga altíð at sýna ynskjunum hjá lokalu myndugleikunum ans, tá nýggjar farleiðir verða stungnar út í kortið. Lokalu myndugleikarnir hava best skil fyri virkseminum í gerandisdegnum, og tað eru lokalu myndugleikarnir, ið eru frægast at stinga út í kortið framtíðarvirksemið í økinum.

Og lagt verður aftrat:

– Við at ganga ynskinum hjá Leirvíkar kommunu á møti, kunnu landsins myndugleikar í verki s‡na, at teir virða ynskini á staðnum og soleiðis eru við til at skapa møguleikar hjá Leirvíkar kommunu at virka og mennast eftir egnum fyritreytum.

# 70 fólk arbeiða upsa á Tavuni

**– Tað liggur lítið eftir, tá ið tú framleiðir upsa, men við rímiliga stórum nøgdum, hongur framleiðslan so nøkulunda saman, sigur stjórin í Tavuni, Jóan Magnus Rasmussen**

FRAMLEIÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Tavuni í Leirvík hava tey havt úr at gera við upsanum í vetur.

Í summarhálvuni arbeiða tey gulllaks, og í vetrarhálvuni arbeiða tey upsa.

Jóan Magnus Rasmussen sigur, at higartil í ár hava tey arbeitt at kalla hvønn dag.

– Tað vóru einir tríggir dagar í januar, at einki arbeiði var á virkinum. Síðan hevur eingin steðgur verið í framleiðsluni.

### Tvær vaktir

Hann vísir á, at tey arbeiða við tveimum vaktum frá mánadegi til og við hósdag, og á báðum vaktunum eru tilsamans eini 70 fólk. Fríggjadag verður so bert arbeitt við einari vakt.

Jóan Magnus sigur, at tað hevur gingið rímiliga væl at fáa fatur á upsa í hesum árinum.

– Vit keypa óskyldan upsa og skilja hann sjálvi. At kalla allur upsin á marknaðinum er óskyldur, leggur hann aftrat.

Tavan virkar upsan til portiónir, og hjáframleiðslan er blokkur, men hetta er ein lutfalsliga lítil partur.

– Vit selja framleiðsluna sjálvi, og størsta keyparalandið av upsavørunum er Frakland.

Jóan Magnus sigur, at tá ið ræður um gulllaksin, er Noreg tað landið, sum keypir størstu nøgdirnar.

– Men vit selja eisini nakað av upsa og gulllaksi til onnur norðurlond, leggur hann aftrat.

### Gulllaksur

Stjórin sigur, at nú rávøruprísurin á upsa er væl hægri, enn hann var um hesa tíðina í fjør, verður helst neyðugt, at ráfiskaprísirnir á gulllaksi eisini fara nakað upp.

– Vit vita ov lítið um marknaðarprísin á gulllaksavørunum í løtun, men prísirnir hava verið uppeftir gangandi í ár.



*Tavan í Leirvík*

Jóan Magnus Rasmussen sigur seg vóna, at tey kunnu fara undir gulllaksaframleiðsluna longu í apríl.

– Fýra skip, Stjørnan og Polarhav og Vesturbúgvin og Eysturbúgvin, plaga at royna eftir gulllaksi í tí betru hálvuni, og eg vóni, at soleiðis eisini verður í ár.

### Skal loysa seg

Hann vísir á, at tað á hvørjum ári er soleiðis, at teir, sum eiga skipini, meta um, hvørt tað loysir seg at leggja um til gulllaks ella ikki.

– Jú, hetta er uppi og vendir á hvørjum ári, men vit vóna, at ráfiskaprísirnir í ár kunnu verða á einum slíkum støði, at skipini aftur í ár fara at leggja seg eftir gulllaksi, sigur Jóan Magnus Rasmussen.